

# At greina og tulka eina stuttsøgu

Byrjan

Les søguna væl og virðiliga ígjøgnum.

- Kanna ókend orð í orðabók
- Greina fløkjasligar setningar

## 1 Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um tekstin, so sum

- hvat slag av teksti er talan um
- hvør hevur skrivað hann
- nær hann er skrivaður og givin út
- forlagið, sum gav út

## 2 Søgugongdin

Greið frá, hvør kjarnin í søguni er
(t.e. søgugongdin stytt til fáar reglur).

## 3 Søgubygging

Greið frá, hvussu søgan er bygd upp.

- Er søgan t.d. sett saman av brotum, skiftir hon í tíð, ella er hon í tíðarrøð (t.e. kronologisk)?
- Er søgan skipað við eini byrjan, einari miðju við hendingum og einum enda?
- Ella byrjar hon in medias res? (Inmedias res merkir: byrjar mitt í hendingunum)
- Hvar er hæddin ella vendin í søguni?
- Er søgan long, er hent at býta hana sundur í partar og gera yvirskriftir. Eisini ber til at gera eina spenningsfarmynd, ið vísir, hvussu spenningurin í søguni er bygdur upp.



## 4 Frásøgufólk

- Er søgan skrivað í 1., 2. ella 3. persóni?
- Hvør sigur hesa søguna?
- Greið frá sjónarhorninum. Eru persónarnir lýstir
  - innanífrá
  - uttanífrá ella
  - bæði innanífrá og uttanífrá
- Hvønn týdning hevur sjónarhornið fyri søguna?

## 5 Tíðin

Frásagnartíð

- Nær er søgan skrivað?
- Er søgan skrivað í nútíð ella tátíð?



## 6 Søgutíð

- Nær fara hendingarnar í søguni fram?

Vís á fyribrigdi í tekstinum, sum geva grundir fyri tíni tíðarfesting.

- Hvussu long er søgutíðin? Tað er tíðin, sum gongur frá søgan byrjar, og til hon endar.
- Eru afturlítandi brot í søguni?
- Um søgan er long, er hent at tekna eina tíðarlinju av søgugongdini.

## 7 Lesaratíð

Ber saman hendingar/umstøður í søgutíðini og tíðini nú og greið frá, hvat er øðrvísi nú. Kundi henda søgan eins væl farið fram í dag? Grund gev fyri tínum sjónarmiðum.

## 8 Stað

Hvar fer søgan fram? Greið frá tí, sum tú veitst um staðið/støðini.

- Hvar eru persónarnir staddir?
- Verða støð nevnd við navni?
- Ella ber til at gita ígjøgnum upplýsingar, hvar søgan fer fram?

## 9 Persónslýsingar

Lýs teir týdningarmestu persónarnar í søguni.

- Greið frá tí, sum tú veitst um teir (útsjónd, eginleikar, arbeiði, familju, fíggjarligar umstøður, samfelagsstætt o.s.fr.).
- Hvør er høvuðspersónurin?
- Hvørjir eykapersónar eru?
- Greið frá sambandinum ímillum persónarnar, um tað er viðkomandi fyri søgugongdina.

## 10 Myndamál

Eru myndamál og samanberingar í søguni?
Vís á dømi í tekstinum

## 11 Sosiala umhvørvið

Í summum søgum hevur sosiala umhvørvið týdning fyri stríðið í søguni.

- Hvar starvast persónarnir?
- Hvørjari stætt hoyra teir heima í?
- Hevur teirra støða í samfelagnum týdning fyri søgugongdina?
- Elvir teirra støða til stríð í søguni? Hvussu?

## 12 Tulking og tema

Tak saman um tað, sum tín greining vísir.
Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Hvønn týdning hevur heitið á søguni?
- Hvørjir mótsetningar eru í søguni?
- Hvat skapar spenningin í tekstinum, og hvør er uppi ímóti hvørjum?
- Eisini kanst tú kanna, hvat persónar ella fyribrigdi umboða í søguni.
- Somuleiðis kunnu ímyndir og myndamál leiða til tulking og tema.

## 13 Boðskapur/hugburður

Hevur søgan ein serligan boðskap til lesaran?

## 14 Tín hugsan

Hvat heldur tú um hesa søguna? Grundgev fyri tínum sjónarmið um.
Er henda søgan viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

# At greina og tulka eina yrking

## Byrjan

Les yrkingina fleiri ferðir ígjøgnum.

- Les hana innantanna og les hana upp
- Kanna ókend orð í orðabók
- Greina fløkjasligar setningar

**Um tekstin**

Greið frá tí, sum tú veitst um yrkingina, so sum

- hvør hevur skrivað hana
- nær hon er skrivað og givin út
- forlagið, sum gav út
- hvørjum hon er ætlað (móttakari)
- hvør ætlanin er við henni (slag av yrking og endamál)

**Kjarnin**

Greið frá, hvør kjarnin í yrkingini er (t.e. innihaldið stytt til fáar reglur)



**Bygging og innhald**

- Hvussu er yrkingin bygd upp ella sett saman? (Er hon t.d. býtt upp í ørindi, ella er hon ein heild?)
- Er hon klassisk ella modernað?
- Er yrkingin lýrisk ella episk ella bæði?
- Hvat verður yrkt um? T.d. kenslur, huglag, fosturlands- ella náttúrualsk, persónar, persónlig sambond, politikk, samfelagslig viðurskifti, átrúnað, ella sigur yrkingin kanska eina søgu?
- Hvat sigur heitið á yrkingini um innihaldið?
- Minst til at kanna endan á yrkingini. Har sæst ofta ein samanumtøka ella ein niðurstøða.



**Røddin í yrkingini**

- Er røddin óbeinleiðis (eingin persónur) ella beinleiðis til staðar í yrkingini t.d. sum eitt eg ella sum ein 3. persónur hon ella hann?
- Vendir frásøgu fólkið sær beinleiðis til lesaran ígjøgnum eitt tú?

**Tíð og stað**

- Kanna, um yrkingin er knýtt til ávísa tíð ella tíðarskeið.
- Kanna, um yrkingin er staðbundin.



**Snildir og mál**

- Eru rím í yrkingini?
- Eru endurtøkur av ávísum orðum ella setningum?
- Hvørjar orðaflokkar er dentur lagdur á?
- Eru serlig orð í yrkingini?
- Eru jalig ella neilig orð, ið hava týdning? T.d. lýsingar-, navn- ella sagnorð
- Hava orðini hjátýdningar? Ella eru tey ítøkilig?
- Er myndamál nýtt í yrkingini?

- Myndburðir?
- Samanberingar? - Sálarkveiking?
- Persónsgerð?
- Ímyndir (symbol)?

**Tulking og tema**

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Heitið á yrkingini
- Hjátýdningar, ið eru knýttir til serlig orð
- Myndamál, ið kann skiljast í fluttari merking
- Mótsetningar og stríð
- Samanbrestir og tvídráttir
- Hvat snýr yrkingin seg í veruleikanum um?

**Tín hugsan**

Hvat heldur tú um hesa yrkingina? Grundgev fyri tínum sjónarmiðum. Er yrkingin viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

**Millumtekstleiki**

- Kennir tú aðrar tekstir (søgur, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

# At greina eina blaðgrein

Byrjan
Les blaðgreinina væl og virðiliga.
- Kanna ókend orð í orðabók
- Greina fløkjasligar setningar

Sendarin
- Hvør er sendarin? T.e. hvør hevur skrivað greinina?

Miðil og evni
- Í hvørjum miðli er greinin skrivað?
- Nær er hon skrivað?
- Hvat er evnið í greinini?
- Ger ein stuttan samandrátt av innihaldinum !

Móttakarin
- Hvør er móttakarin?
- Hvussu kanst tú vita, hvør móttakarin er?
- Hvussu hevur sendarin hugsað um, hvør móttakarin er?
- Eru innihald og tekstur lagað til móttakaran?

Endamál og ætlan
- Við hvørjum endamáli er greinin skrivað?

Bygnaður og uppseting
- Hvussu er blað greinin sett upp? Hugsa um myndir, yvirskriftir, brellbita, millumyvirskriftir og breyðtekst
- Eru yvirskriftin og millumyvirskriftir í samsvari við innihaldið í tekstinum?
- Eru snildir brúktar,. sum fanga móttakaran (lesaran) ?



Er teksturin LOGOS, ETOS ella bæði? Og hvussu sæst tað í tekstinum?
- LOGOS: vendur sær til vitið hjá móttakarinum
- ETOS: vendur sær til kenslurnar hjá móttakarinum






Opið ella afturlatið samskifti
- Er talan um opið ella afturlatið samskifti?
- Er greinin løtt ella torskild at lesa?

Opiðsamskifti: greinin er skrivað, so øll skilja innihaldið.
Afturlatið samskifti: greinin er skrivað, so bara fá hava førleika at lesa hana.
Dømi um afturlatið samskiftieru t.d. yrkisbløð til læknar við latínskum heitum.

Objektivt (partleyst)
ella subjektivt (partískt) skrivingarlag
- Er talan um partleyst (objektivt) ella partískt (subjektivt) skrivingarlag?
- Er sendarin partleysur ella partískur?
- Er hann sakligur og upplýsandi?
- Er hann kensluborin og persónligur?



Partleyst (objektivt) skrivingarlag: nevtralt, upplýsandi og sakligt

Partískt (subjektivt) skrivingarlag: kensluborið og persónligt



Upplýsandi ella ávirkandi endamál
- Ætlar sendarin (loyniliga) at ávirka móttakaran við síni skriving?
- Vil sendarin hava móttakaran at taka støðu og koma í part við sær?
- Vil sendarin upplýsa og kunna móttakaran um evnið, hann skrivar um?
- Greið frá endamálinum og ætlanini við greinini.

GG. Svara við støði í tekstinum og greiningini.

Er hetta ein góð og áhugaverd grein/tekstur? Hví? Ella hví ikki?



# At greina og tulka myndir

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eina ávísa mynd, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum er nevnt í frymlinum, er at finna í eini mynd. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til tína mynd og legg tað aftur at ella burturúr, sum tú heldur ella ikki heldur, er viðkomandi fyri tína greining.

***GG.*** *Minst altíð til at vísa á dømi í myndini og at grundgeva fyri tínum uppáhaldum.*

Nøkur orð og hugtøk í frymlinum eru litað *blá* og skrivað við skákskrift. Í høgra bredda standa orðafrágreiðingar til hesi orð og hugtøk.

## Byrjan

Kanna myndina væl og virðiliga

## Um myndina

Greið frá tí, sum tú veitst um myndina, so sum

- hvør hevur gjørt hana
- nær er hon gjørd
- hvussu er hon gjørd (tilfar)
- hvat slag er myndin (t.d. málningur, fotomynd, viðgjørd mynd ella lýsing)

## Hvat sæst á myndini?

- Hvat er í *forsýni*, *miðsýni* og *baksýni*?
- Er javn vág í myndini?
  Eru allir partar javnstillaðir, ella skarar onkur framúr?
- Um persónar eru á myndini, hvussu er teirra kropsburður?
  Er hann t.d. opin ella læstur?
  Hvussu eru teirra andlitsbrøgd?
  Sæst t.d. gleði, sorg, látur, grátur, líkasæla ella spenningur?
  Hvussu er samspælið teirra millum? T.d. tættleiki/frástøða?

**Orðafrágreiðingar**

| | |
|---|---|
| *Forsýni:* | Tað er tað, sum sæst fremst í myndini |
| *Miðsýni:* | Tað er tað, sum sæst í miðjuni í myndini |
| *Baksýni:* | Tað er tað, sum sæst aftast í myndini |

## Hvussu er myndin bygd upp?

- Hvussu er myndin skipað?
  Er hon t.d. skipað við *miðjuni sum savningardepli*, *symmetriskt*, *tríkantskompositión* ella *diagonalt*? Hvar er „*gylti skurðurin*"?
- Er *rørsla í myndini*
- Hvussu við frásjónini í myndini?
  Er hon vanlig, nær ella fjar?
- Hvussu við sjónarhorninum?
  Er talan um *ervafrásjón*, *miðfrásjón* ella *neðrafrásjón*?

## Eygnariv, ljós og litir í myndini

- Hvat er *eygnarivið í myndini*?
- Hvussu við ljósinum í myndini?
  Er talan um natúrligt ljós ella ljós frá t.d. eini lampu, ella er talan um symbolskt ljós? Er skuggi á myndin?
- Hvussu eru litirnir í myndini?
  T.d. ljósir ella døkkir, *heitir* ella *kaldir*?

## Umhvørvið og tíðin í myndini

- Hvar eru vit stødd?
- Hvussu er umhvørvið?
- Hvørjir lutir eru á myndini?
  Hoyra lutirnir til í okkara samtíð?
  Hvat siga teir um tíðina í myndini?
- Eru ímyndir (eisini nevnt symbol) í myndini?
- Hvussu er klædnabúnin?
  Ganga vit soleiðis ílatin í dag?
- Hvat sigur hann um tíðina í myndini?

## Sigur myndin eina søgu?

- Er ein søga í myndini?
- Hvussu er huglagið í myndini?
  Hvørjar tankar og kenslur vísir myndin?
  Hvat hugsar tú, tá ið tú sært myndina?
  Hvussu upplivir tú myndina?

## Tak samanum og tulka myndina

- Hvat sigur heitið um myndina?
- Hvussu hevði tú nevnt hana, um hon var tín?
- Hvørjir mótsetningar síggjast í myndini?
- Tulka myndina
- Umboðar myndin nakran ávísan samfelagsbólk?
- Kennir tú aðrar myndir, ið minna um hesa?
- Viðger myndin eitt tema, ið sæst aftur í øðrum listagreinum?

**Orðafrágreiðingar**

*Miðjan sum savningardepil:*



*Symmetrisk:*



Tríkantskompositión:



Diagonalt:



Gylti skurðurin:



| | |
|---|---|
| Ervafrásjón: | sæð uppi frá og niður |
| Miðfrásjón: | sæð beint inn á myndaevnið |
| Neðrafrásjón: | sæð niðri frá og upp |

| | |
|---|---|
| Rørsla í myndini: | diagonalar linjur (linjur á skák) skapa rørslu og elva til spenning; beinar linjur skapa ró og stilli |
| Eygnarivið í myndini: | tað, sum fyrst fellur í eyguni |

Heitir litir: Sí myndina
Kaldir litir: Sí myndina





# At greina og tulka ævintýr

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eitt ávíst ævintýr, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum nevnt er í frymlinum, er at finna í einum og sama ævintýri. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til títt ævintýr og legg tað aftur at ella tak tað burturúr, sum tú heldur, er viðkomandi ella óviðkomandi fyri tína greining.

***GG.*** *Minst altíð til at vísa á dømi í ævintýrinum og at grund geva fyri tínum uppáhaldum.*

## Um tekstaslagið

Ævintýr er tekstaslag, ið er partur av tí, sum vit nevna „*skaldskapur av mannamunni*“ – eisini nevnt „munnmentir“. Sí Tekstasløg skaldskapur av mannamunni, har ævintýr eru nærri umrødd.

## Byrjan

Les ævintýrið væl og virðiliga ígjøgnum.

- Kanna ókend orð í orðabók

## Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um tekstin, so sum

- tekstaslag
- hvat eitt ævintýr er
- hvør munur er á einum ævintýri og eini vanligari søgu
- høvund
- útgávuár

## Søgugongdin

Greið frá, hvør kjarnin í ævintýrinum er (t.e. søgugongdin stytt til fáar reglur).

## Søgubygging

Greið frá, hvussu ævintýrið er bygt upp.

- Hvussu byrjar tað?
- Er ævintýrið skipað við eini byrjan, einari miðju við hendingum og einum enda? Greið frá tí.
- Hvussu endar tað?
- Hvar er hæddin ella vendin?
- Er søgu gongdin býtt upp í heima– úti –heima? Um so er, vís hetta býtið.
- Hvørjar hendingar fara fram í ævintýrinum, sum ikki eru í vanligum søgum?
- Hvørji tøl verða nevnd?
- Tú kanst mynda søgugongdina sum eina brúgv við byrjan, hendingar og enda

## Frásøgufólk

- Er ævintýrið skrivað í 1., 2. ella 3. persóni?
- Hvør er frásøgufólk?
- Hvør ber sjónarhornið?
- Eru persónarnir lýstir innanífrá, uttanífrá ella bæði?

## Tíðin

#### Søgutíð

- Nær fara hendingarnar í ævintýrinum fram? Vís á fyribrigdi, sum geva grundir fyri tíni tíðarfesting.
- Hvussu long er søgutíðin? Tað er tíðin, sum gongur frá ævintýrið byrjar, og til tað endar.
- Eru aftur lítandi brot?

## Stað

Hvar fer ævintýrið fram? Greið frá tí, sum tú veitst um staðið/støðini.

- Hvar eru persónarnir staddir?
- Verða støð nevnd við navni?

## Persónslýsingar

- Hvørjir persónar/verur eru í ævintýrinum?
- Greið frá tí, sum tú veitst um teir.
- Hvør er høvuðspersónurin?
- Hvørjir eykapersónar eru?
- Hvør er hetjan í ævintýrinum?
- Greið frá sambandinum ímillum persónarnar.
- Brúka *aktantfrymilin* at lýsa sambandið ímillum persónarnar

**GG.** Tú finnur *aktantfrymilin* og frágreiðing um, hvussu hann kann brúkast her: Sí slóðina til Tekstasløg skaldskapur av mannamunni

## Málið og skrivingarlagið

Hvat eyðkennir málið í ævintýrinum?

- Er málið gerandisligt ella háfloygt?
- Er stílurin knappur ella tungur? Vís á dømi.
- Hvørjir orðaflokkar eru serliga væl umboðaðir?
- Hvat verður serliga væl lýst?

## Myndamál

Eru myndamál og samanberingar í ævintýrinum? Vís á dømi í tekstinum

## Tulking og tema

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Hvønn týdning hevur heitið á ævintýrinum?
- Hvørjir mótsetningar eru?
- Hvat skapar spenningin í ævintýrinum, og hvør er uppi ímóti hvørjum?
- Eisini kanst tú kanna, hvat persónar ella fyribrigdi umboða í ævintýrinum.

## Millumtekstleiki

Kennir tú aðrar tekstir (søgur, yrkingar, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

## Boðskapur/hugburður

Hevur ævintýrið ein serligan boðskap til lesaran?

## Tín hugsan

Hvat heldur tú um ævintýrið? Grundgev tíni sjónarmið. Er ævintýrið viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?